# Bóka

LF2014

Dagført: 11-08-2015

# Innihaldsyvirlit Síða


| | |
|---|---|
| Lat bókingarrútin upp | 4 |
| Byrja at bóka | 5 |
| Næsti bókingarteigur | 5 |
| Mvg | 5 |
| Hækka/lækka bókingardagfesting | 6 |
| Nýtt skjalanummar | 7 |
| Útrokning av upphædd, valuta, hagtøl í teigum | 8 |

Her sæst hvussu bókingar vera gjørdar í Lundanum

**Lat bókingarrútin upp**
**Ger soleiðis:** Vel DAGLIGT->BÓKINGAR







Vanliga verður bóka í skuffuna dagligt, sum er tilknýtt eitt tíðarskeið, sum avgerð hvat árstal kann nýtast til bókingina.
Her er tað tíðarskeið 2015-01

Inntøppa verður í teigarnar niðast á myndini og er dagurí fyrstu kolonnu, síðan skjal, o.s.v

**Byrja at bóka:**
Fyri at byrja at bóka skal man velja **Stovna** ella trýsta á **Insert.** So verður fyrsti teigurin við dato/Dagur tøkt at tøppa í.

**Næsti bókingarteigur:**
Trýst á **Enter** fyri at koma til næsta teig í bókingarlinjuni.
Trýst á **Esc** fyri at bakka.

Bókingin er liðug tá trýst verður á Enter í teiginum Tekstur.

**MVG:**
Er mvg kota knýtt at konto, sum verður brúkt í bókingarlinjuni, so er næsti teigur aftaná upphædd ikki Tekstur, men Debit mvg ella Kredit mvg. (Kann vera bæði um bæði Debit og Kredit kontan hava mvg kotu)
Har ber so til at rætta útroknaðu mvg-upphæddina, áðrenn trýst verður á Enter fyri at fara til seinasta teigin við bókingartekstinum.



**Hækka/lækka bókingardagfesting**

Í staðin fyri at inntøppa nýggju dagfestingina, er møguligt er økja dagfestingina við at trýsta á + (pluss) og lækka við at trýsta á - (minus).

Dømi:

Seinasta skjal sum var bóka hevði dagfestingina 01-08-2014, skjali vit nú skulu bóka hevur dagfestingina 02-08-2014.

Vit standa í teiginum dagur, trýst verður á + og síðan Enter, og dagfestingin verður 02-08-2014.







Verður trýst 2 ferðir á + og síðan Enter, økist dagfestingin við 2 døgum. os.v







**Verður trýst á - *(minus)* í staðin so lækkar dagfestingin.**

**Nýtt skjalanummar**
Møguligt er á ein lættan hátt at áseta næsta skjalanummari.
Tá ein er komin til teigin skjal verður trýst á + og skjalanummari hækkar eitt upp, trýst á Enter og klárt er at inntøppa í næsta teigin.
T.d skjalanummari er 6000, trýst verður á + og síðan Enter og skjalanummari verður 6001.




Verður trýst 2 ferðir á + og síðan Enter, hækkar skjalanummari 2 upp. os.v




**Verður trýst á - *(minus)* í staðin so lækkar skjalanummari.**

**Úrrokning av upphædd, valuta, hagtøl í teigum**
Møguligt er at rokna í teigunum upphædd, valuta og hagtøl. Tað merkir at í staðin fyri at nýta roknimaskinuna til t.d at leggja saman tølini, sum skulu inntøppast, so kann hetta gerast beinleiðis í tí ávísa teiginum.

Dømi:
Vit hava ein sølufaktura har samlaða søluupphæddin ikki framgongur.
Upphæddirnar eru hesar 1000 kr, 500 kr, 4500 kr.
Hetta inntøppa til í teigin upphædd við + í millum og tá trýst verður á Enter, verður upphæddin roknað.







Tilber eisini at trekkja frá, falda og býta. Og at nýta alt í sama felti.
Tó skal leggjast í geyma at um falda ella býta er í, so sær skipanin tað sum at klombrur eru um tølini hvørjumegin við falda ella býta.
Dømi: 5 kr + 6 kr*3 skipanin sær hetta sum 5+(6*3) t.vs = 23 og **ikki** soleiðis ~~(5+6)*3 =33~~

Dømi:
Skulu inntasta hvussu nógvar USD upphæddin á 6000 kr svarar til, vit vita at kursurin er 6 kr pr USD




